# Royndi at myrða kvinnu

Ein innbrotstjóvur royndi leygardagin at myrða eina norska kvinnu, tá hann koyrdi hana yvir við Næstved Storcenter. Tað metir løgreglan, sum seint í gjárkvøldið handtók mannin, tá hesin sjálvur meldaði seg á løgreglustøðini. Kvinnan, sum er fyrst í 40-unum, varð løgd inn á Ríkissjúkrahúsið við lívshóttandi skaða. Hon og familjan skuldu keypa inn í Bilka, tá tey varnaðust, at ein tjóvur hevði brotið inn í húsvorg teirra. Kvinnan stillaði seg fyri, tá tjóvurin stakk av í bili við tí úrsliti, at hon varð niðurkoyrd.




# Trý avrættað í USA

Tríggir tannáringar blivu avrættaðir meðan ein fjórði slapp við lívinum í tí, sum líkist eini gøtubandauppgerð. Hendingin fór fram um hálvgum tólvtíðina sunnukvøldið á einum spæliplássi við Mount Vernon skúlan í Newark, New Jersey. Tey dripnu eru ungi menninir Deshawn Harvey og Terrance Aeriel og unga kvinnan Ofemi Hightower. Ein onnur genta, 19-ára gamla Natasha Aeriel, sum er systir til ein av teimum dripnu, slapp við lívinum. Hon liggur nú á lokala sjúkrahúsinum og er uttan fyri lívsvanda.



*Teir søkja aftur til røturnar. Og nú royna teir eisini at líkjast formanni Sjálvstýrisfloksins í útsjónd, sigur Kári P. Højgaard*

# Aftur til røturnar

**- Tað var stuttligt at hoyra nýggja formannin í Fólkaflokkinum boða frá politisku kós síni, tí tað var sum at lesa stevnuskrá Sjálvstýrisfloksins, sigur Kári P. Højgaard**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sjálvstýrisflokkurin er tann flokkur, sum liggur Fólkaflokkinum nærmast í hugsjónum. Tí er tað heldur ikki løgið, at júst hesir báðir flokkarnir ofta hava verið í samstarvi. Í nýggjari tíð hevur tað so verið Anfinn Kalsberg, ið Sjálvstýrisflokkurin hevur havt við at gera.

- Ja, vit hava oftani verið í samgongu við Fólkaflokkin, og eg kann bara siga, at vit altíð hava havt eitt sera gott samstarv við Anfinn Kalsberg, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýriflokkinum.

Hinvegin so er hann serstakliga glaður fyri proklamatiónina hjá nýggja formanninum í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen.

- Ja, eg má sjálvandi fegnast um útmeldingina hjá Jørgen Niclasen. Hann siteraði jú stevnuskrá Sjálvstýrisfloksins í sjálvstýrismálinum, sigur Kári P. Højgaard.

Formaður Sjálvstýrisfloksins vísir víðari á, at eisini Tjóðveldisflokkurin leggur stóran dent á tað, sum stendur í stevnuskrá Sjálvstýrisfloksins, so allir møguleikar standa opnir fyri einum sjálvstýrislandsstýri eftir komandi val.

- Eg eri fegin um, at báðir flokkar leggja dent á røturnar, tí báðir eru sprotnir úr Sjálvstýrisflokkinum. Bæði formaður Tjóðveldisfloksins og nýggi formaðurin í Fólkaflokkinum hava eisini lagt seg eftir at líkjast formanninum í Sjálvstýrisflokkinum, nú teir báðir eru í holt við at anleggja sær skegg, sigur Kári P. Højgaard.

# Má vísa orð í verki

**Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, er ikki serliga bergtikin av útmeldingunum hjá nýggja formanninum í Fólkaflokkinum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

»Føroyar leysar av donskum pengum, og fólkaatkvøða um ríkisrættarligu støðuna í seinasta lagi ár 2015«.

Tað var proklamatiónin hjá Jørgeni Niclasen, nýggja formanninum í Fólkaflokkinum. Og hetta skuldi verið søtur tónleikur í oyrunum á Tjóðveldisflokkinum, men so er ikki.

- Tað verður neyðugt hjá Jørgeni Niclasen at broyta Fólkaflokkin, tí hann er vorðin ein reinur sambandsflokkur. Hann hevur heft heitið »Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne« á okkum. Og so vóni eg, at hann torir at gera upp við ábyrgdarleysa figgjar- og skattapolitikkin, sum Fólkaflokkurin hevur havt stóra ábyrgd av seinasta valskeiðið, sigur Høgni Hoydal.

Men hetta er ikki nóg mikið.

– Eg vóni eisini, at hann torir at gera upp við seráhugamálini í føroyskum vinnupolitikki, so vit kunnu fáa eitt frælst og liberalt vinnulív uttan nøkur framíhjárættindi, sigur formaður Tjóðveldisfloksins víðari.



*Jørgen má vísa í verki, at hann meinar tað, hann sigur. Og hann kann passandi standa við tær avtalur, ið gjørdar vóru í 1998, sigur Høgni Hoydal*

Høgni Hoydal sigur, at tað er av stórum týdningi, at Jørgen Niclasen undan valinum vísir í verki, at hann vil broytingar og ikki ætlar at koyra í somu rillu.

- Fyrsta stigið í so máta er at standa við tær avtalurnar, sum gjørdar vóru í 1998, og sum flokkurin síðani leyp frá. Tað verður avgerandi fyri føroyskan politikk og fyri samstarvsmøguleikarnar frameftir, sigur Høgni Hoydal, sum tó samstundis nýtir høvið at ynskja Jørgen Niclasen tillukku við formanssessinum.

# Stór avbjóðing

**Kaj Leo Johannesen, sum sjálvur er ungur floksformaður, ávarar nýggja formannin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen, um, at tað er ein stór uppgáva at taka upp á seg**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Jørgen má venja seg við, at tá hann úttalar seg, so er tað ikki bara fyri seg sjálvan, men fyri allan flokkin, og tað er ein heilt nýggjur leiklutur, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.

- Uppgávan verður savnandi og semjusøkjandi, og sum leiðari í flokkinum er tað hansara fremsta mál at fáa tað besta fram, sum flokkurin kann bjóða, vísir Kaj Leo víðari á.

FormaðurSambandsfloksins sigur, at tað tekur tíð at finna seg til sættis í starvinum sum nýggjur floksformaður, og frá egnum royndum veit hann, at tað tekur eini tvey ár at gerast rættiliga tryggur við sín nýggja leiklut.

- Tað er neyðugt at sleppa lokala spjaldrinum, tí sum floksformaður er mann um nakað politikari fyri alt landið, sigur Kaj Leo Johannesen.

FormaðurSambandsfloksins væntar tó ikki, at tað fer at verða nakar trupulleiki at samstarva við Fólkaflokkin eftir formansskiftið.

- Á borgarliga vonginum verður í hvussu er eingin trupulleiki. Og hvat sjálvbjargni viðvíkur, so er tað ikki upp til okkum, men til Fólkaflokkin at gera av, hvat hann vil. Mín uppgáva er so at finna semjur við allar flokkar, og tað ber eisini til so leingi vit fara so væl við øðrum, sum vit sjálvi vilja verða viðfarin, si gur



*Tað tekur eini tvey ár at finna seg til sættis í formanssessinum, sigur Kaj Leo Johannesen*

Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.